## Kunning til hoyringspartar

### í sambandi við at Lógaruppskot um Realin nú verður sent í nýggja hoyring

Endamálið við hesum skrivinum er at greiða frá teimum broytingum, ið eru framdar í uppskotinum eftir hoyring. Fyrst verður greitt frá teimum hoyringssvarum, ið komu inn í sambandi við hoyring og støðuna hjá Fíggjarmálaráðnum til hesi. At enda verður víst eitt yvirlit yvir tær samlaðu broytingarnar eftir hoyring.

Hoyringssvar við viðmerkingum komu frá Vinnuhúsinum, Landsbankanum og Tryggingareftirlitinum.

**Landsbanki Føroya:**
*Til §7, stk. 1*
Her mælir Landsbankin til, at tað eisini verður møguligt hjá Realinum, at læna beinleiðis frá landskassanum.
*Hetta tekur Fíggjarmálaráðið ikki undir við, tí hetta samsvarar við, at landið fíggjar skip beinleiðis. Fíggjarmálaráðið er av teirri áskoðan, at útlánini hjá Realinum eiga at verða grundað á eginpeningin hjá stovninum, og at tann eykafígging, sum stovnurin í sambandi við sítt útlánsvirksemi hevur tørv á, má stovnurin sjálvur útvega sær á fíggjarmarknaðinum.*

*Til § 16*
Her mælir Landsbankin til, at Realurin verður álagdur at leggja inn í búskaparskipan landsins hvønn mánað fíggjarstøðuna hjá stovninum og hvønn ársfjórðing eisini roknskapin. Landsbankin vísur á, at fyri uppgávununa hjá landsbankanum um fíggjarligt støðufesti, er tað umráðandi fyri bankan at kunna fylgja við í fíggjarstøðuni hjá Realinum eins og landsbankin ger tað hjá peningastovunum.
*Her kann Fíggjarmálaráðið vísa á, at við uppskotinum verður Realurin tikin við í Landsroknskapin, og í hesum liggur eisini skyldan at lata inn upplýsingar til búskaparskipanina. Mett verður tó ikki neyðugt at seta hetta beinleiðis í lógina. Men Fíggjarmálaráðið ætlar at fáa tað ásett í viðtøkunum fyri stovnin, at hann letur upplýsingar til búskaparskipanina mánaðarliga.*

**Vinnuhúsið**
*Til § 1, stk. 1, 3.pkt.*
Her vísir Vinnuhúsið á, at tey hava ilt við at síggja tørvin á eini skipan við útflutningsfíggingartrygd, eisini ivast tey í, um Realurin er rætti stovnurin til hesa uppgávu.
*Her kann Fíggjarmálaráðið vísa á, at heimildin til at veita útflutningsfíggingartrygd er tikin úr uppskotinum.*

*Til § 1, stk. 2*
Fyri at fáa fígging frá Realinum krevst, at skipið hevur heimstað í Føroyum. Sambært uppskotinum kunnu skip í undantaksføri og í mesta lagi 12 mánaðir skrásetast í fremmandari skipaská. Her mælir Vinnuhúsið til, at ásetingin um, at hetta einans ber til í undantaksføri, verður strikað, og tey halda ikki, at nøkur avmarking at vera í longdini av tíðarskeiðnum, men um hetta verður mett neyðugt, eigur talan at vera um í minsta lagi 5 ár.

*Hetta hevur Fíggjarmálaráðið ikki tikið til eftirtektar, tí hildið verður fast í, at høvuðsendamálið við Realinum framvegis eigur at verða at veita fígging til skip, ið hava heimstað í Føroyum.*

*Til § 3, stk. 1*
Her ger Vinnuhúsið vart við, at Reiðarafelagið fyri Handilsskip eisini eigur at hava umboð í umboðsnevndini.
*Hetta hevur Fíggjarmálarráðið tikið til eftirtektar. Í galdandi lóg útnevndir Føroya Reiðarafelag 2 limir; í nýggja uppskotinum – sum nú verður sent í hoyring – útnevna Føroya Reiðarafelag og Reiðarafelagið fyri Handilsskip hvør sín lim.*

**Tryggingareftirlitið:**
*Yvirskipað*
Her vísir Tryggingareftirlitið á, at tey ikki av sínum eintingum hava gjørt nakra yvirskipaða eftirmeting av lóggávuni um Realin ella nakra neyvari greining av, á hvørjum økjum eftirlitið metir lógina vera ótíðarhóskandi. Men tey kunnu eitt nú vísa á viðurskifti um m.a. leiðslu og stýring, útveiting, kapital og likviditet, sum eiga at verða viðgjørd meiri ítøkiliga, um samanborið verður við samsvarandi reglur fyri fíggingarstovnar og tryggingarfeløg.
*Her kann Fíggjarmálaráðið vísa á, at endamálið við uppskotinum fyrst og fremst er at dagføra lógina soleiðis, at hon er í tráð við tann hátt, sum Realurin virkar í dag. Men Fíggjarmálaráðið ásannar, at nógv er hent innan lóggávuna á peningastovnsøkinum seinnu árini. Krøvini til fíggingarstovnar eru økt munandi. Fíggjarmálaráðið er í hesum sambandi í fer við at kanna, um ein nýtímansger av lógini er neyðug á øðum økjum. Tryggingareftirlitið er í hesum sambandi eisini biðið um, at koma við teimum orðingum, ið eftirlitið metir skulu til, fyri at gera lóggávuna fullgóða eisini á hesum øki.*

*Til § 1, stk. 1, 2. pkt.*
Tey vísa á, at endamálsorðingin er ógreið við atlitið til orðini: "før", "flótandi eindir" og "sjóvinnu".
*Fíggjarmálaráðið hevur tikið hetta til eftirtektar. Endamálsorðingin er nú broytt. Talan er nú um "før og flótandi eindir", og orðið sjóvinna er nú strikað.*

*Til § 1, stk. 1, 3.pkt.*
Her vísir Tryggingareftirlitið á tær bygnaðarligu og løgfrøðiligu broytingar, ið eru neyðugar, um stovnurin skal fara undir at veita útflutningsfíggingartrygd.
*Her kann Fíggjarmálaráðið vísa á, at Skipanin við útflutningsfíggingartrygd er sum sagt tikin úr nýggja uppskotinum.*

*Til § 7, stk. 1*
Tryggingareftirlitið metir, at orðingin av ásetingin kann geva eina fatan av, at Realurin ikki hevur møguleika at taka eina vanliga bankafígging (kassakredit) ella lines frá øðrum peningastovnum, men einans skuldarbrøv og lánsbrøv. Hetta hevur neyvan verið ætlanin, og tískil verður mælt til at nágreina ásetingina.
*Fíggjarmálaráðið hevur tikið hetta til eftirtektar, nú verður skoytt uppí, at stovnurin eisini kann útvega sær fígging við vanligari lántøku.*

*Til § 8, stk. 5*
Tryggingareftirlitið metir, at ásetingin í § 8, stk. 5 í uppskotinum gevur ikki Realinum neyðuga heimild at reka annað virksemi enn tað, sum framgongur av endamálsorðingini í § 1. Um ætlanin er, at Realurin skal hava sama møguleika sum peningastovnar til fyribils at reka annað virksemi, fyri at tryggja ella avvikla givin lán ella til tess at viðvirka til umskipan (omstrukturering) av feløgum, mælir Tryggingareftirlitið til at áseta hetta í lógina.
*Fíggjarmálaráðið hevur tikið hetta til eftirtektar og broytt ásetingina soleiðis, at Realurin í sambandi við kreditoravtalur kann reka annað virksemi enn tað, sum er ásett í endamálsorðingini.*

*Til § 13*
Trygggingareftirlitið vísir á, at orðingin er óheppin, tí ásett verður, at landsstýrismaðurin í fíggjarmálum kann áseta reglur um arbeiðið hjá Tryggingareftirlitinum, ið er stovnur undir Uttanríkis- og vinnumálaráðnum.
*Fíggjarmálaráðið hevur tikið hetta til eftirtektar, og hevur – í samskifti við Uttanríkis- og vinnumálaráðið – funnið eina nýggja orðing.*

Niðanfyri verður víst eitt yvirlit yvir broytingarnar sum eru framdar í uppskotinum eftir fyrstu hoyring.

| **Broytingar eftir 1. hoyring** | |
|---|---|
| **Uppskot í hoyring:** | **Uppskot í nýggja hoyring:** |
| § 1, stk. 1, 2. pkt. verður orðað soleiðis:<br>“Endamál stovnsins er at veita vinnulán við veð í flótandi eindum innan sjóvinnu við heimstaði í Føroyum, til nýbygging, umbygging, keyp og sølu umframt umfígging.” | § 1, stk. 1, 2. pkt. verður orðað soleiðis:<br>“Endamál stovnsins er at veita vinnulán við veð í **førum og flótandi eindum** við heimstaði í Føroyum, til nýbygging, umbygging, keyp og sølu umframt umfígging.” |
| Í § 1, stk. 1 verður aftan á 2. pkt. sum nýtt pkt. set:<br>“Harumframt kann stovnurin veita útflutingsfíggingartrygd í sambandi við útflutning av veiddum fiski sambært nærri ásetingum í viðtøkunum.” | Strikað |
| § 1, stk. 2, verður orðað soleiðis:<br>“Í undantaksføri kunnu lántakarar hjá Realinum í eitt tíðarskeið skráseta flótandi eindir í fremmandari skipaskrá, tó í mesta lagi 12 mánaðir.” | § 1, stk. 2, verður orðað soleiðis:<br>“Í undantaksføri kunnu lántakarar hjá Realinum í eitt tíðarskeið skráseta **før og flótandi** eindir í fremmandari skipaskrá, tó í mesta lagi 12 mánaðir.” |
| § 1, stk. 4, nr. 1, verður orðað soleiðis:<br>“1) flótandi eindir innan umveldisvídd Hoyvíkssáttmálans, um farið v.m. hevur heimstað í Føroyum, og” | § 1, stk. 4 verður orðað soleiðis:<br>“Stk. 4. Kravið um heimstað í Føroyum, sum er ásett í § 1, stk. 1, 2. pkt. er ikki galdandi fyri: |

| | |
|---|---|
| | 1) **før og flótandi eindir** innan umveldisvídd Hoyvíkssáttmálans, um farið ella flótandi eindin hevur virkisstað í Føroyum, og<br>2) eigarin av **farinum ella flótandi eindini** er fevndur av Hoyvíkssáttmálanum og hevur heimstað innan umveldisvídd sáttmálans.” |
| § 3, stk. 1, verður orðað soleiðis:<br>“Vald verður umboðsnevnd, ið virkar ráðgevandi fyri nevndina hjá stovninum. Ráðgevandi umboðsnevndin hevur 8 limir, 2 valdir av landsstýrismanninum, 2 av lántakarum stovnsins, 2 av Føroya Reiðarafelag, meðan Føroya Fiskimannafelag, Føroya Skipara- og Navigatørfelag og Maskinmeistarafelagið eru saman um at velja 2 limir.” | § 3, stk. 1, verður orðað soleiðis:<br>“Vald verður umboðsnevnd, ið virkar ráðgevandi fyri nevndina hjá stovninum. Ráðgevandi umboðsnevndin hevur 8 limir, 2 valdir av landsstýrismanninum, 2 av lántakarum stovnsins, **1 av Føroya Reiðarafelag og 1 av Reiðarafelagnum fyri Handilsskip,** meðan Føroya Fiskimannafelag, Føroya Skipara- og Navigatørfelag og Maskinmeistarafelagið eru saman um at velja 2 limir.” |
| § 7, stk. 1 verður orðað soleiðis:<br>“Stovnurin kann útvega sær útlánspening við útgávu av skuldarbrøvum ella lánsbrøvum ljóðandi uppá stovnin samsvarandi reglunum í viðtøkum stovnsins.” | § 7, stk. 1 verður orðað soleiðis:<br>“Stovnurin kann útvega sær útlánspening **við vanligari lántøku, og** við útgávu av skuldarbrøvum ella lánsbrøvum ljóðandi uppá stovnin samsvarandi reglunum í viðtøkum stovnsins.” |
| § 8, stk. 4-7 verða orðað soleiðis:<br>....<br>*Stk. 5.* Stovnurin kann undir serligum umstøðum strika skuld hjá lántakara ella gera aðrar kreditoravtalur, tá útlitini hjá lántakara gera, at ein slík loysn er til fíggjarligan fyrimun fyri stovnin. | § 8, stk. 4-7 verða orðað soleiðis:<br>...<br>*Stk. 5.* Um útlitini hjá lántakara gera, at ein slík avtala er til fíggjarligan fyrimun fyri stovnin, kann stovnurin undir serligum umstøðum strika skuld hjá lántakara og gera aðrar kreditoravtalur, **herundir eisini avtalur, ið innibera, at stovnurin fyribils kemur at reka annað virksemi enn tað, sum er ásett í §1.** |
| § 13 verður orðað soleiðis:<br>“**§ 13.** Landsstýrismaðurin hevur eftirlit við stovninum. Tryggingareftirlitið útinnir eftirlitið vegna landsstýrismannin. Stovnurin skal, tá tað verður kravt, lata eftirlitinum allar upplýsingar. Landsstýrismaðurin ger reglugerð fyri uttanhýsiseftirlitið.” | § 13 verður orðað soleiðis:<br>“**§ 13.** Landsstýrismaðurin hevur eftirlit við stovninum. **Landsstýrismaðurin kann gera avtalu við avvarðandi landsstýrismann um, at Tryggingareftirlitið hevur eftirlit við stovninum.** |